Jóhan Petur Davidsen, uppsagdur yvirlækna

# - Sjúkrahúsleiðslan vil vísa sína makt

**Í vikuni bleiv leiðandi yvirlæknin á kirurgiska deplinum á Landssjúkrahúsinum, Jóhan Petur Davidsen, sagdur úr starvi sínum bæði sum yvirlækni og sum leiðandi skurðlækni. Sjálvur heldur Jóhan Petur Davidsen, at talan er um eina maktdemonstratión frá sjúkrahúsleiðsluni**

LÆKNAUPPSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Leiðandi yvirlæknin á skurðdeildini og serlæknin, Jóhan Petur Davidsen, sum nú er sendur til hús av leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, heldur talan verða um eina maktdemonstratión av sjúkrahúsleiðsluni*
*savnsmynd*

Úti á Hamrinum á Argjum situr ein tann fremsti læknin í Føroyum, Jóhan Petur Davidsen, og tekur sær av løttum. Fyri fáum døgum síðani var hann leiðandi skurðlækni og yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, men so gav sjúkrahúsleiðslan honum sekkin, og hann er tí farin til hús.

### Ósamdur í at niðurleggja virksemið

Jóhan Petur Davidsen sigur, at hann í farnu viku hevði ein fund við leiðsluna á sjúkrahúsinum, har tosað var um støðuna í sambandi við verkbannið á almenna arbeiðsmarknaðinum.

- Eg var ósamdur við leiðsluna í at niðurleggja alt virksemi, meðan arbeiðssteðgur var. Eg haldi, at Landssjúkrahúsið er ov skjótt til at fara út og fremja samhugatiltøk í staðin fyri at verja okkara kundar, sjúklingarnar, ið verða sleptir upp á fjall. Vit skulu minnast til, at Landssjúkrahúsið er ein tænastufyritøka, sigur Jóhan Petur Davidsen.

Uppsagdi yvirlæknin sigur, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum nú arbeiðir við, hvussu man kann arbeiða, hóast arbeiðssteðgur er, og tað heldur hann verða pínligt.

### Maktdemonstratión

Talan er ikki um fyrstu ferð, at Jóhan Petur Davidsen er komin upp á kant við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, og sjálvur ivast hann ikki í, at tað er høvuðsorsøkin til, at hann er sagdur úr starvi.

- Mín loyalitetur liggur fyrst og fremst á skurðdeildina, har eg havi havt mína dagligu gongd, og tað hava starvsfólkini altíð vita. Eg havi verið sera opin í mínum leiðsluhátti, og starvsfólkini vita, at tey altíð hava mín fulla stuðul. Tað hevur ikki dámt leiðsluni, og nú vilja tey bara av við meg, bæði sum leiðandi yvirlækna og sum serlækna. Hetta eyðkennir systemið, at man velur at offra eitt serøki fyri at vísa sín makt, tí talan er í veruleikanum um eina maktdemonstratión. Í veruleikanum kunnu vit staðfesta, at sjúkrahúsleiðslan er diktatorisk. Tey vilja geva eitt dømi um, at tað eru tey, ið hava maktina, sigur Jóhan Petur Davidsen.

### Skal síggja gott út

Sambært Jóhan Peturi Davidsen er tað ein afturvendandi trupulleiki, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum í alt ov stóran mun hugsar um, at tað skal síggja gott út, heldur enn at hugsa um sjúklingarnar.

- Í mínari verð er tað sjúklingaviðgerð, ið tað snýr seg um á Landssjúkrahúsinum. Leiðslan hevur í alt ov stóran mun hugsa um prestiguprojekt og ikki um tað, sum hevur við sjúklingarnar at gera. Hesum havi eg ikki verið samdur í, og tað hevur verið ein pína fyri leiðsluna. Leiðslan hevur ynskt fleiri ting, ið síggja gott út, men har havi eg ikki verið við, tí vit tá gloyma, hvat sjúkrahúsverkið er til, sigur Jóhan Petur Davidsen, sum heldur, at sjúkrahúsleiðslan als ikki hevur føling við, hvat gongur fyri seg á sjúkrahúsinum, og heldur ikki vísir hesum áhuga.

### Stuðul frá starvsfólkunum

Jóhan Petur Davidsen sigur, at síðani hann fór til hús, hava nógv av starvsfólkunum á skurðdeildini vent sær til hansara og stuðla honum.

Sjálvur heldur Jóhan Petur Davidsen, at skurðdeildin er ein vælvirkandi deild, har trivnaðurin er góður. Sambært uppsagda yvirlæknanum er stórur áhugi fyri at sleppa at arbeiða á deildini.

Nú arbeiðir Jóhan Petur Davidsen so við einum svari til hoyringarskrivi, ið hann hevur fingið frá leiðsluni, men sjálvur trýr hann ikki uppá, at svarið hjá honum fer at broyta nakað.

- Sum so hava vit onga rættartrygd her í Føroyum. Tað endar helst við, at málið endar í rættinum, og so fái eg í mesta lagi eitt endurgjald. Tað er ongantíð komið fyri, at rætturin krevur, at tænastumaðurin verður settur aftur í starvið, sigur Jóhan Petur Davidsen at enda.

# Ivast í grundarlagnum fyri uppsøgnini

**Formaðurin í Læknafelagnum, Hans Petur Nielsen, sigur, at felagið metir málið um uppsøgnina hjá Jóhan Petur Davidsen sum sera álvarsamt, og felagið ivast í grundarlagnum fyri uppsøgnini**

LÆKNAUPPSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hans Petur Nielsen sigur, at út frá fyrileggjandi tilfari í málinum um uppsøgnina av Jóhan Petur Davidsen, leiðandi skurðlækna, er tað sera, sera ivasamt, um grundarlag er fryi at fara eftir hansara støðu sum yvirlækna og harvið tænastumanni.

### Yvirlæknarnir fara at viðgerða málið

- Læknafelagið sær ógvuliga álvarsligt upp á tann partin av málinum, sum snýr seg um siga Jóhan Petur Davidsen upp sum tænastumann, sigur Hans Petur Nielsen.

Sjálvur er Hans Petur Nielsen yvirlækni á medesinsku deild, og hann sigur, at yvirlæknakollegiið á Landssjúkrahúsinum í næstum fer at viðgerða málið innanhýsis, tí yvirlæknarnir halda eisini málið verða ógvuliga álvarsligt.

*Formaðurin í Læknafelagnum, Hans Petur Nielsen, sigur, at felagið sær ógvuliga álvarsligt upp á málið um uppsøgnina av Jóhan Petur Davidsen sum yvirlækna.*
*savnsmynd*



## Úttala seg ikki í persónsmálum

**Sjúkrahússtjórin, Poul Geert Hansen, vil ikki gera viðmerkingar til uppsøgnina hjá Jóhan Petur Davidsen, men hann váttar, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum fer at mæla Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, at siga Jóhan Petur Davidsen endaliga úr starvi sínum**

LÆKNAUPPSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri, vil ikki gera viðmerkingar til málið um uppsøgnina av Jóhan Petur Davidsen, yvirlækna, tí talan er um eitt persónsmál. Sjúkrahússtjórin sigur, at málið nú gongur sína gongd*
*savnsmynd*

Poul Geert Hansen sigur, at talan er um eitt persónsmál, og tí vil leiðslan ikki gera nakrar viðmerkingar til málið.

- Vit úttala okkum ikki í persónsmálum, men nú er prosessin farin í gongd. Vit hava sent eitt hoyringarskriv til Jóhan Petur Davidsen um ætlaðu uppsøgnina, sum hann hevur 14 dagar til at svara uppá. Vit eru ikki uppsagnarmyndugleiki, men um svarið hjá Jóhan Petur Davidsen ikki broytir nakað upp á ætlanirnar hjá okkum, fara vit at senda eitt tilmæli til landsstýrismannin um at siga mannin úr starvi. Hans Pauli Strøm er uppsagnarmyndugleiki í hesum máli, og tí skal málið so fara víðari frá honum, tá ið tað er komið so langt, sigur Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri.